**KVINNUVAL**

*– Menningin innan nógv arbeiðsøki fer so skjótt fram, at ert tú burtur av arbeiðsmarknaðinum í eitt ár í barnsburðarfarloyvi, kanst tú verða afturúrsigld. Og tá ið tað oftast eru kvinnur, sum eru í barnsburðarfarloyvi, eru tað kvinnurnar, sum verða afturúrsigldar, sigur Ása Olsen.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Innlitið hjá kvinnum vantar í føroyskum politikki

**– At kvinnur ikki sita við valdið, sæst væl aftur í samfelagnum. Hygg bara at, hvørja raðfesting eldraøkið og barnaansingin fáa. Í grundini eru flestu starvsøki, har mest sum bara kvinnur arbeiða, illa umboðað í tinginum, sigur Ása Olsen, valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymoy, hvørs hjartamál er eldrapolitikkur**

KVINNUVAL
*Turið Kjølbro*

– Menn síggja bara menn mangan. Er valið millum eina kvinnu og ein mann til eitt leiðandi starv, verður maðurin valdur sum oftast, hóast rættiliga nógvar kvinnur í dag hava høgar útbúgvingar. Henda siðvenja er avgjørt ein forðing hjá kvinnum, sum ynskja at koma sær fram, sigur Ása Olsen.

Lógin um almenna fyrisiting ásetir, at tann best skikkaði umsøkjarin fær starvið, uttan mun til kyn.

– Um lógin verður hildin alla staðni veit eg ikki, men vit vita, at væl skikkaðar kvinnur eru fyri vanbýti. Um tað er tí, at tær eru í barnsburðaraldri ella annað talar fyri, at tær ikki fáa starvið, er ilt hjá mær at meta um. Kanska átti at verðið kannað, hvussu lógin um almenna fyrisiting verður umsitin – um ikki fyri annað, so fyri at varpa ljós á hendan problematikkin. Hinvegin rokni eg við, at almenni starvsfólkapolitikkurin, sum kemur av løgmansskrivstovuni, har ein kvinna er stjóri, fer at gera sítt til, at reglur fyri starvssetan verða hildnar betur í framtíðini. Broytingin til tað betra er byrjað.

– Sum kvinna skalt tú arbeiða tvær ferðir so nógv sum ein maður fyri at verða hoyrd og viðurkend. Hetta kann ikki vera rætt. Tær kvinnur, sum eru komnar fram, hava sanniliga stríðst fyri tí og nógv meiri enn menn eru noyddir. Ikki so sjáldan síggja vit, at menn koma beint av skúlabonki í eitt høgt leiðandi starv, sigur Ása Olsen, og leggur afturat. – Møguliga halda teir seg meiri framat enn kvinnur.

## Kvinnur vilja ikki

Sjálv onnur bjóðar hon seg fram á Sjálvstýrislistanum í Suðurstreymoy sum kvinnuligt valevni.

– Tað er ógvuliga ringt at fáa kvinnur at stilla upp. Á listanum hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymoy áttu vit at verið nógv fleiri. Haldi ikki, at órógvin í flokkinum er orsøkin til, at fleiri ikki vilja, tí eisini til tey undanfarnu valini hava fáar kvinnur stillað upp. Og millum valini er nógv virksemi í flokkinum, sigur Ása Olsen.

Men hóast hon og flokkur hennara annars av øllum alvi hava roynt at fingið fleiri kvinnur at stilla upp til løgtingsvalið, heldur hon avgjørt ikki, at kynskvotering er vegurin at fáa fleiri kvinnur upp í politikk.

– Verður ásett við lóg, hvussu nógvar kvinnur skulu á ting, taka vit rættin frá kvinnum at velja. Áhugin hjá kvinnuni má vera tað, sum er avgerandi fyri, um hon fer upp í politikk ella ikki.

– Nógv verður tosað um kvinnur í politikki, men siga allar nei, kemur eingin inn á ting. Sjálv ivaðist eg, um eg skuldi stilla upp, men kom ásamt við meg sjálva um, at tað nyttar ikki at tosa og tosa um kvinnur í politikki, um allar sýta fyri at gera seg galdandi.

– Kvinnur umbera seg við, at tær hava ikki tíð, og tað skilji eg væl. Sjálv rokni eg ikki við, at eg hevði stillað upp, um eg hevði smábørn. Í mínum ættarliði er tað eisini meiri vanligt, at maðurin hevur eina karrieru og konan tekur sær av børnum og heimi.

Um hon fer at seta kvinnuspurningar á politisku dagsskránna, verður hon vald, sigur Ása Olsen, at á so nógvum økjum í samfelagnum og í politiskum orðaskifti kann ljóskastarin setast á kvinnuna.

– Innlitið, kvinnur hava, vantar í føroyskum politikki. Tað sæst væl aftur í samfelagnum, at kvinnur ikki sita við valdinum, hygg bara at, hvørja raðfesting eldraøkið og barnaansingin fáa. Í grundini eru flestu starvsøki, har mest sum bara kvinnur arbeiða, illa umboðað í tinginum. Nú síggja vit, at flestu flokkar gera vart við seg í valstríðnum júst við bleytu virðunum og teir siga seg vilja raðfesta tey høgt. Hinvegin er ikki rætt at siga, sum hesir flokkar bera fram, at als einki er hent á eldraøkinum seinastu árini. Uppskúling av heimahjálparum er sett í verk, og annað er farið í gongd. Eitt nú er játtan sett av til at fara í gongd við ellis- og røktarheim í Norðstreymoy, útbygt verður í Eysturoynni, fleiri sambýli eru komin og eitt sambýli fyri dement verður bygt í Havn. Í mun til tørvin munar hetta ikki nógv, men tað ber ikki til at nøkta tørvin, sum var í 1998, uppá fýra ár, sigur Ása Olsen.

Ása Olsen, 46 ára gomul, ættað úr Øravík, búsitandi í Havn. Eigur fýra børn í aldrinum 21 til 27 ár, og tvey ársgomul ommubørn. Útbúgvin bókhaldari og innan almenna fyrisiting á merkonomstøði, umframt tikið prógv í leiðslu og pedagogikk. Starvast hálva tíð sum náttarvakt á eldrasambýli. Varð vald í nevndina hjá Heilsuhjálparfelagnum í 1995 og hevur síðani 1996 verið forkvinna í felagnum.

Eru viðurskifti hjá kvinnum á arbeiðsmarknaðinum, ikki í stóran mun ein fakfelagsspurningur?

– Bæði og, men hinvegin hava allir stovnar eina játtan til rakstur og íløgur, sum teir skulu halda seg innan fyri. Hvar íløgurnar verða gjørdar, hvørji tól verða skift út, ger leiðslan av, men rópar ein bólkur hart, verður hann hoyrdur. Tað er stríðið á B6 herfyri eitt dømi um. Men tað er ógvuliga trupult at koma úti frá og vísa á, hvat kann gerast øðrvísi á einum stovni. Uppgávan hjá fakfeløgunum er at arbeiða fyri eini betri løn og góðum arbeiðsumstøðum til sínar limir. Hinvegin er tað ein bardagi mangan, tí fyri limirnar í Heilsuhjálparfelagnum, sum nógvir eru úti í heimunum hjá teim eldru, eru umstøðurnar ógvuliga vánaligar og lønin alt ov lítil í mun til uppgávu og ábyrgd. Ongar aðrar umstøður í landinum kunnu samanberast við hesar. Men í mun til fyrr eru tað fólk í dag, sum ikki finna seg í hesum, sigur Ása Olsen.

## Ansa eftir

Fleiri flokkar gera vart við seg í spurninginum um longt barnsburðarfarloyvi. Eisini Ása Olsen tekur undir við, at foreldur kunnu verða longri heima hjá sínum smáu, men hon hevur kortini nøkur fyrivarni.

– Menningin innan nógv arbeiðsøki fer so skjótt fram, alt verður dagført alla tíðina og nýggjar telduskipanir verða tiknar í brúk, at ert tú burtur av arbeiðsmarknaðinum í eitt ár til dømis, kanst tú verða afturúrsigld. Og tá ið tað oftast eru kvinnur, sum eru í barnsburðarfarloyvi, eru tað kvinnurnar, sum verða afturúrsigldar. Innan onnur øki er tað lættari at verða burtur. Tískil haldi eg, at tað er ógvuliga umráðandi, at longt barnsburðarfarloyvi verður eitt val og at eftir farloyvið er stovnspláss tøkt til barnið. Eisini eigur at verða tryggjað foreldrum, at um tey taka av longdum barnsburðarfarloyvi, skal tað ikki ganga út yvir ansingarmøguleikan, sigur Ása Olsen.

Og ein vanda sær hon afturat.

– Verður barnsburðarfarloyvið longt í næstum, kann tað gerast ein sovipúta hjá kommunum. Tað kann hugsast, at tær ikki skunda sær so nógv at nøkta tørvin á stovnsplássum, sigur Ása Olsen, og leggur afturat.

– Tað hevði verið gott, um pápar í størri mun enn vit síggja í dag, fara heim at taka sær av sínum børnum, um barnsburðarfarloyvið verður longt. Fóru páparnir heim einar tríggjar mánaðir til dømis, eri eg sannførd um, at tørvurin á stovnsplássum varð skjótari nøktaður. Tað er eftir øllum at døma truplari hjá monnum at fara úr arbeiði heim at ansa børnum – og gomlum foreldrum eisini. Eg kenni eingi dømi um, at synir fara heim at taka sær av óhjálpnum foreldrum. Kanska yngri ættarlið hugsa øðrvísi.

## Lopfjølin

Hjá mongum er fakfelagsarbeiði lopfjøl til at fara uppí politikk. Ása Olsen var limur í Sjálvstýrisflokkinum, áðrenn hon fór upp í fakfelagsarbeiði, men ikki fyrr enn tá gjørdist hon virkin limur í flokkinum. Hon stillaði upp fyrstu ferð til løgtingsvalið seinast og aftur til býráðsvalið fyri tveimum árum síðani.

– Eg havi altíð havt áhuga fyri samfelagsviðurskiftum, tí eisini politikki. Fakfelagsarbeiði og politikkur hava nógv við hvørt annað at gera. Í dag er rættiliga vanligt, at fakfeløg melda greitt út eitthvørt, sum hevur samband við førda politikkin. At vera virkin í politikki og fakfelagsarbeiði samstundis gevur eftir mín meting báðar vegir. Til dømis kenni eg eldraøkið innanífrá og veit hvør tørvur er og hvar, og tískil er tað lættari hjá mær eitt nú enn øðrum, sum ikki kenna økið, at gera nakað munagott fyri økið. Eldraøkið hevur ongantíð verið raðfest nóg høgt, so annaðhvørt mugu fólk, sum starvast í økinum, upp í politikk at gera nakað fyri økið, ella mugu hesi hoyrast betur enn tey verða í dag. Vit kunnu í øllum førum staðfesta, at tað ikki verður lurtað nóg væl.

Ovast á listanum yvir mál, hon ætlar at arbeiða við, verður hon vald inn á ting, er at nøkta tørvin á røktarheims- og sambýlisplássum umframt at arbeiða fyri, at døgnrøkt verður sett á stovn.

– Verður døgnrøkt sett á stovn, fáa nógv fólk eina ella tvær vitjanir um náttina. Hetta hevði verðið ein munandi bati, ikki bara hjá teimum eldru, men eisini ein tryggleiki hjá teirra avvarðandi. Eisini fólk, sum eitt nú hava krabbamein ella aðra álvarsliga sjúku og sum eru heima, høvdu fingið ágóða av eini døgnrøkt. Og nógv eldri fólk høvdu kunnað búð longri heima, um døgnrøkt var.

At gera fortreytirnar betri hjá føroyskari vinnu at kappast mótvegis útlendskum fyritøkum, er eisini eitt mál, Ása kundi hugsað sær at arbeitt við.

– Dømi eru um, at útlendskar fyritøkur vinna í kappingini mótvegis føroyskum fyritøkum í Føroyum, tí tær fáa útflutningsstuðul og nógvan frádrátt. Fortreytirnar fyri at bjóða uppá arbeiði í Føroyum eru rættiliga ymiskar, og sjálv haldi eg, at tað er ógvuliga spell, at útlendskar fyritøkur vinna á føroyskum fyritøkum, tá ið arbeiði í Føroyum skal gerast. Frádráttirnir, sum føroyskar fyritøkur fáa í sambandi við ferðing, um tær arbeiða í fleiri bygdum, er nærum einki aftur ímóti tí, sum útlendskar fáa. Vit skulu ikki gera tað verri hjá útlendskum fyritøkum at arbeiða í Føroyum. Ístaðin eiga vit at gera tað líka gott hjá føroyskum fyritøkum við eitt nú skattafríum frádrátti til ymiskt. Heldur ikki er rætt at minka frádráttin, sum føroyskir handverkarar uttanlands fáa. Tað tvingar fólk heim. Einasta, sum kemur burtur úr, er, at handverkararnir verða skrásettir uttanlands, sigur Ása Olsen at enda í viðtali.



*– Sum kvinna skalt tú arbeiða tvær ferðir so nógv sum ein maður fyri at verða hoyrd og viðurkend. Hetta kann ikki vera rætt. Tær kvinnur, sum eru komnar fram, hava sanniliga stríðst fyri tí og nógv meiri enn menn eru noyddir, sigur Ása Olsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*